TING-HELLAN

# gugransking



John Stuart Mill



Immanuel Kant




ella um ein slík betring t.d. oyðileggur aðrar eginleikar. Ábyrgdarsiðsemin heldur, at tað ikki skal broytast ov nógv.

### Samanumtikið

Samanumtikið er at siga, at nógv hendir á hesum økinum, og at nógvar truplar siðsemiligar avgerðir skulu takast. Gagnsiðsemin roynir í mestan mun at hyggja eftir hvat gevur mest av sær og tí skal støða so hvørt takast til menningina innan ílegugransking. Ábyrgdarsiðsemin hevur hornasteinar, sum skulu verjast. Tað kann verða, at lív er frá tí, at egg er gitið og tí má ikki granskast í eggum ella embryonum, fyri at verja einstaklingarrættindi. Gagnsiðsemin heldur her fast um, at granskingin fer fram í eggum og embryonum sum eru frávald og tí ikki høvdu komið at verið lív hóast alt og at henda gransking er alneyðug fyri at finna viðgerðarhættir á ymsum torførum sjúkum, sum vit ikki kunnu gera nakað við ídag.

Menningin fer fram aðrastaðni, uttan mun til hvat vit gera í Føroyum.

Eru vit við kunnu vit ávirka. Men eru vit ikki við, er eingin møguleiki at ávirka nakað sum helst og helst mugu vit sjálvi keypa vitanina aftaná.

*Komandi greinin verður um patent innan ílegur.*

# Nýggju karmarnir



Thomas Arabo

### Tambaða heimastýrislógin

Atli Dam, sáli plagdi mangan at siga at heimastýrislógin kundi tambast so nógv at hon rakk líka at loysingini. Hann var eisini ófórur at tamba hana. Undir hansara leiðslu rukku vit fleiri mál á sjálvstýrisleið, sum í fyrstu atløgu sóu ómøgulig út. Best minnast vit nokk undirgrundaravtaluna, eitt ótal av fiskiveiðusátmálum, ræðisrætt á flogferðsluni og so framvegis. So var tað tey tíðarskeiðini hann ikki sat í landsins leiðslu - tá var eingin at tamba hesa góðu lóg.

### Sjálvstýrislógin á tapetið

Atli - realistur sum hann var - dugdi væl at síggja at skuldi samanhangur verða í sjálvstýristilgongdini, so máttu nýggir karmar gerast um samstarvið ímillum Danmark og Føroyar. Sostatt bleiv longu fyri 20 árum síðan eitt arbeiði byrjað at tilevna eina sokallaða sjálvstýrislóg . Aðrir flokkar fylgdu eftir, og síðst í 90'unum høvdu vit eina heila bukett av slíkum lógum við ymiskum nøvnum. Mest líktust Javnaðar og Fólkafloksuppskotini. Tjóðveldisflokkurin hevði sum væntað einki uppskot innan ríkismark.

### Fullveldislandsstýrið

Um Fólkaflokkurin vildi loysn á sjálvstýrismálinum, so skuldi tað verið so líka til, at hann í 1998 gjørdi samgongu við Javnaðarflokkin. Tað gjørdi hann ikki, men fór eftir Tjóðveldinum ístaðin. Endan á tí kærleikanum hoyrdu vit nú um dagarnar úr fólkatinginum ( ! ). Formaður tjóðveldisfloksins mundi mist oyrini, segði hann. Betur var um hann hevði brúkt tey betur nakað fyrr.

### Spurningur um prioritering

Ein má gera sær greitt, at Fólkaflokkurin prioriterar fólkaflokspolitikk framum sjálvstýrispolitik. Teir hava ágrýtnar og málrættaðar politikarar, og meðan løgmaður í fullveldislandsstýrinum undirhelt varaløgmann og hansara fylgi við vøkrum orðum og rokfundum í Keypmannahavn, so blómaði fólkaflokspolitikkurin her heima. Niðurskurðurin í blokkinum var kanska ein máti at tvinga eitt komandi landsstýri inn í eina privatiseringsprosess. Eingin veit.

### Nýggju lógirnar

Tað var gott at Sambandsflokkurin tók undir við nýggju lógunum. Skemtiligt at hoyra at sambandstingfólk hildu seg til føroyskar viðmerkingar, meðan tjóðveldisfólkini í Tinginum bara lósu danskt. Lógirnar eru nú samtyktar og okkara Landsstýrið er valt at umsita tær lógir, sum løgtingið samtykkir. Dómsvaldið dømir eftir løgtingslógum, og allar hesar undarligu útleggingarnar, ein sær, um nú løgtingið hevur lóggávumyndugleika ella ikki, eru tvætl.

### Nú skulu lógirnar brúkast

Sum tað sær út beint nú, so er ikki ráð til nógvar yvirtøkur - so har verður neyvan farið langt innan nýggju karmarnar. Øðrvísi er við uttanríkisheimildunum. Tað sum ræður um, er at Landsstýrið ger sær púra greitt, hvat er møguligt at brúka tær til, og hvat ikki er møguligt. Tjóðveldisflokkurin og miðlarnir vilja royna at provokera støður fram, har nýggju lógirnar ikki kunnu nýtast. Til dømis sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum, í ES, í Nato, í ST o.s.fr.

So her skal hugsast væl, áðrenn lagt verður til brots.